



*»… tað er týdningarmikið, at nýggju økini í kommununi ikki síggja tað soleiðis, at tey eru undirløgd Runavíkar kommunu, men at hetta er ein virkin felagsskapur, har vit royna at fáa tað besta burtur úr fyri allar partar…«*

*(Magnus Rasmussen, borgarstjóri)*

*»… nú eri eg knappliga vorðin ein almennur persónur, og fyri meg er hetta ein ógvuliga stór broyting. Eg føli meg væl móttiknan allastaðni, har eg eri komin …«*

*(Magnus Rasmussen, borgarstjóri)*

vónar tó, at tey tiltøk, sum býráðið hevur gjørt av at seta í verk, verða nóg mikið til at stabilisera fíggjarligu viðurskiftini hjá kommununi í hesum ári.

– Vit sóu beinanvegin, tá árið byrjaði, at neyðugt fór at verða við sparingum á útreiðslusíðuni í mun til fíggjarætlanina, sum undanfarna býráð legði. Í dag fegnist eg um, at vit gripu so skjótt inn, og eg fegnist ikki minni um, at full semja hevur verið í býráðnum fyri sparingum.

Borgarstjórin sigur, at tað skjótt sást, at inntøkurnar fóru ikki at halda.

– Soleiðis, sum gongdin hevur verið seinastu 5 mánaðirnar, høvdu við løgdu fíggjarætlanini einar 7-8 miljónir krónur væntað í, tá árið varð liðugt. Vit hava gjørt av at fremja skerjingar og tillagingar á øllum økjum fyri einar 7 miljónir krónur, og tað er serliga á tekniska økinum, at skerjingar eru framdar.

Hann sigur, at fólk sum heild skilja og góðtaka, at neyðugt er við hesum tiltøkum, og tey skilja umstøðurnar.

– Vit vóna, at viðurskiftini fara at broytast rætta vegin, tá hetta árið er liðugt.

Spurdur, hvar í inntøkugrundarlagnum, at afturgongdin er, sigur Magnus:

– Hetta er eitt sindur ilt at siga ítøkiliga, men eg havi varhugan av, at eitt nú fiskimenn hava tjent minni í ár, samstundis sum virksemið í smiðjuvinnuni og byggivinnuni annars er minkað. Eg haldi tó ikki, at nógv fólk ganga arbeiðsleys í økinum.

Borgarstjórin fegnast um, at kommunan hevur eitt fjølbroytt vinnulív við støðugum virksemi hjá eitt nú Faroe Seafood í Saltangará, Landingarmiðstøðini í Saltangará, Bakkafrost á Glyvrum og øðrum vinnuvirkjum, sum eru knýtt at havinum.

– Vinnulívið í kommununi er fjølbroytt. Vit hava fleiri bein at standa á, og hetta kemur væl við í tíðum sum hesum, tó at inntøkugrundarlagið í ár av fleiri orsøkum hevur verið minkandi, leggur Magnus aftrat.

## Ikki anonymur

Magnus sigur, at hann trívist væl í starvinum sum borgarstjóri.

– Men hetta er ein stór broyting hjá mær og familju míni. Tá eg var lærari, kom eg tíðliga til hús seinnapartar. Nú eri eg nógv minni við hús, og arbeiðsdagurin er mangan langur. Javnan noyðist man eisini at vera við til ymisk tiltøk sum umboð fyri kommununa.

Magnus er giftur Eydnu, sum er úr Fuglafirði. Tey eiga børnini Jákup, sum er 13 og Kirstin, sum er 11 ár.

– Eg fái stóran uppbakning heimanífrá. Fekk eg ikki tað, hevði hetta slett ikki borið til. Vit vita jú eisini, at hetta starv er fyri eina tíð, leggur hann aftrat.

Borgarstjórin er framvegis bóndi við stívliga 200 seyðum, men hevur bróður sín, Arnold, sum býr í Søldarfirði, til hjálpar, tá tað er neyðugt. Honum dámar eisini væl at fáast við seyð og landbúnað.

Ein velduga stór broyting hjá Magnusi er, at hann – frá at vera ein anonymur persónur – nú er vorðin kendur millum fólk.

– Hetta merki eg væl, tá eg eri millum fólk og úti á gøtuni. Eg noyðist bara at viðganga, at eg ikki á sama hátt eri anonymur longur. Tá eg áður kom úr skúlanum og heim til Lambar, smoygdi eg meg í arbeiðsklæðini og fór í hagan. Nú eri eg knappliga vorðin ein almennur persónur. So, fyri meg er hetta ein ógvuliga stór broyting.

Magnus sigur, at hann hevur følt seg væl móttiknan sum nýggjur borgarstjóri.

– Eg føli, at eg eri væl móttikin allastaðni, har eg eri komin, leggur hann aftrat.

## Virkið samstarv

Borgarstjórin heldur tað hava stóran týdning, at fólk eru positiv og líta frameftir – ikki minst í tíðum sum hesum.

Hann fegnast um, at viðurskiftini við hinar partarnar í kommununi, sum eru teir nýggjastu í Runavíkar kommunu, eru góð, og her eru tað ikki minst tær staðbundnu nevndirnar, sum knýta saman millum økini.

– Tað er týdningarmikið, at hesi økir ikki síggja tað soleiðis, at tey eru undirløgd Runavíkar kommunu, men at hetta er ein virkin felagsskapur, har vit skulu royna at fáa tað besta burtur úr fyri allar partar, sigur Magnus Rasmussen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu.

Í triðstørstu kommunu landsins búgva 3.800 fólk.

*Orð & myndir: Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*